# Jarðskjálvti við Svalbard

Norski jarðfrøðistovnurin skásetti í gjár ein jarðskjálvta á havbotninum nærhendis Svalbard. Skjálvtin var 4,6 á Richterstiganum, og miðdepilin í honum var einar 90 fjórðingar í landssynning úr Longyerbýnum, skrivar tíðindastovan NTB. Jarðfrøðingurin Tormod Kværna sigur við blaðið Svalbardposten, at tey hava ikki frætt frá fólki, sum varnaðust skjálvtan, men at fleiri mátistøðir skrásettu hann. Jarðfrøðingurin sigur, at tey seinastu árini hava fleiri jarðskjálvtar verið nærhendis Svalbard. Tann harðasti var tann 21. februar í 2008. Hann var 6,0 á Richterstiganum.




# Bensinleki í Nuuk

Sløkkiliðið í Nuuk í Grønlandi hevði úr at gera gjáranáttina við at taka upp 13.000 litrar av bensini, sum vóru farnir við síðuna av, tá tangaskipið Purha var við bensini til oljufelagið Polaroil. Blaðið Sermitsiaq skreivar, at bensinið rann út í eina byrging, sum er við tangarnar á havnarlagnum í Nuuk. Upprunaliga varð sagt, at 6.000 litrar av bensini vóru farnir við síðuna av, men tað vísti seg, at talan var um 13.000 litrar, skrivar Sermitsiaq. Sambært blaðnum hendi óhappið av einum menniskjaligum mistaki.

# iina til hinar bingjurnar



*Tað ber ikki longur til at uppliva sermerkta listaverkið »Bládýpið« hjá Trónda Patursson í Føroyum.*

*Mynd: Kjartan Madsen*



*»Bládýpið« uttan fyri Norðurbryggjuna á kvøldi í Keypmannahavn*

## Kosmisk rúmkensla

Soleiðis lýsir Inger Smærup Sørensen, listfrøðingur, listaverkið »Bládýpið«

- Verkið »Bládýpið« hjá Tróndi Paturssyni er eitt høvuðsverk í føroyskari list. Tað er ein stórfingin uppliving at stíga inn í bláu bingjuna við inngongdina til Listasavn Føroya – ein "kosmisk rúmkensla" hevur onkur nevnt tað. Kenslan av tí endaleysa, av máttloysi og vektloysi er ørandi. Haldi ikki, at nakað listafólk megnar sum Tróndur Patursson at arbeiða við tí stórfingna. Hansara verk eru hvørki vøkur ella eiggilig, tey eru stórfingin sum náttúran er stórfingin.

- Tá tú stígur inn í »Bládýpið« ringir listaverkið seg um tín kropp – ja tekur ræði á kroppinum.

- Kanska gera verkini hjá Tróndi Paturssyni okkum var við ókendar síður av veruleikanum. Hann ger okkum var við okkurt, sum er eins fremmant sum alheimsins endaloysi er okkum fremmant. Eg veit ikki, men í hvussu so er tað stórfingna her, tí vit kunnu ikki stýra okkara egnu hugsanum og kenslum, tá vit standa í ella framman fyri einum av listaverkunum hjá Tróndi Paturssyni, og á tann hátt fer hansara list nærum út um alt listarligt mark.

- »Bládýpið« er eitt tað besta dømi um, hvat Tróndur Patursson megnar sum listamaður.

*(Dimmalætting 15.08.2008)*

inni á listasavninum, sigur Finn Terman Frederiksen.

### Við á heimsfram-sýning

Tað hevur Helgi Fossadal hinvegin ongar ætlanir um. Hóast tekningar longu fyriligga til útbygging av Føroya Listasavni, er onki pláss at hóma til høvuðsverkið hjá eitt av størstu føroysku listafólkunum.

– Vit hava ongar ætlanir um at gera pláss fyri verkinum inni á Listasavninum ella á annan hátt knýta »Bládýpið« til listasavnið. Sum sagt, so meini eg framvegis, at bingjan hóskar betri onkustaðni úti á keiuni, sigur Helgi Fossadal.

*Men hví stendur hon so har uttanfyri Listasavnið?*

– Tað veit eg ikki. Tað er væl tí, Tróndur Patursson brúkar túnið hjá okkum sum parkeringspláss til bingjuna. Hann hevur jú verið runt alla møguliga staðni við hasi bingjuni, minnir leiðarin á Listasavninum á.

Og tað er rætt, at verkið hevur verið víða um, tí áhugin fyri »Bládýpinum« er stórur. Tá tað longu í fjør fréttist, at Helgi Fossadal vildi hava Trónd Patursson at koma og fjerna bingjuna, fekk listamaðurin alt fyri eitt fleiri fyrispurningar frá listasøvnum uttanlands, sum fegin vildu hýsa verkinum.

– Men eg vil hava, at »Bládýpið« skal vera í Føroyum. Eg havi latið listasavninum verkið sum gávu, og tí er tað ogn hjá føroya fólkið, sigur Tróndur Patursson.

So seint sum í gjár kom ein fyrispurningur úr Hollandi um at lána »Bládýpið« til listarligu heimsframsýningna, sonevndu Bienaluna í 2011. Tað hevur listamaðurin onki ímóti, men verkið er heimahoyrandi í Føroyum, sigur hann.

### »Jarðarferðin« yvir á farstøðina ...

Í løtuni bendir tó alt á, at føroyingar mugu leita sær út í heim, um teir vilja sleppa at uppliva listaverkið, tí leiðarin á listasavninum fer ikki at lata tað upp.

– Fólk kunnu biðja Trónd Patursson um ein lykil, um tey vilja inn, sigur Helgi Fossadal

*Men hann hevur jú handað tær lyklarnar?*

– Tað kann gott vera, men so má hann skifta lásið út, sigur leiðarin á Føroya Listasavni.

Spurdur, hvat hann heldur um hugskotið at koyra »Bládýpið« út á keiina til hinar bingjurnar sigur Tróndur Patursson

– Nei, tað haldi eg ikki er rætt. Tað svarar eitt sindur til at Listasavnið skilir seg av við eitt av høvuðsverkunum hjá Mikinesi og til dømis koyrir »Jarðarferðina« yvir á farstøðina og letur onkran hanga málingin upp har.